FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

16. august 2021
Mál: 21/15343-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-004/2021

Svar til fyrispurning 52-004/2021 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um nýtt tilfeingi, kvotur og gjøld í fiskivinnuni.

Spurningar:

1. Við teimum kvotum og tí nýggja makreltilfeingi, sum Føroyar hava ásett í 2021, hvussu nógv hevði verið boðið út á uppboðssølu, um lógin hjá undanfarnu samgongu enn var í gildi (sjófeingislógin sum var galdandi í 2018 og 2019)?

2. Hvussu nógv hevði verið boðið út í tonsum í 2021 av ávikavist:

   - Makreli
   - Norðhavssild
   - Svartkjafti
   - Botnfiski í Barentshavinum og við Svalbard?

3. Hvussu stór hevði inntøkan verið hjá landskassanum av hesum uppboðum, umframt veiðigjøld, um miðalprísirnir vóru teir somu fyri fiskasløgini sum í 2018 og 2019?

4. Hvussu stórur er munurin í mun til tað, sum nú verður mett í inntøku til landskassan av veiðigjøldum í 2021?

5. Hvussu stórar høvdu menningarkvoturnar verið í tonsum í 2021 av makreli, norðhavssild og svartkjafti, um sjófeingislógin hjá undanfarnu samgongu enn var í gildi?

Svar:

Til nr. 1.
Sambært lóg um fyrisiting av sjófeingi, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 126 frá 5. august 2019, er ásett í § 15, at:

Um heildarkvotan er lægri ella ájavnt við ásettu nøgdirnar í nr. 1-6, verða ávikavist 25%, 15%, 15%, 15%, 15% og 15% av nøgdini bjóðað út sum sølukvota:

1) *350.000 tons av svartkjafti.*
2) *90.000 tons av makreli.*
3) *65.000 tons av norðhavssild.*
4) *27.000 tons av botnfiski í Barentshavinum.*
5) *3.100 tons av toski á Flemish Cap.*
6) *1.900 tons av botnfiski í Eysturgrønlandi.*

Stk. 2. Er heildarkvotan størri enn nøgdirnar, ásettar í stk. 1, nr. 1-6, verður nøgdin, sum er omanfyri, boðin út á uppboði sum uppboðsárskvota, samanber tó § 18.

(§ 18. Nýggj rættindi at veiða kunna verða boðin út á uppboði sum sølukvota).

Til nr. 2.
Makrelur:
43.406 tons, harav 7.057 tons sum sølukvota og 36.349 tons sum uppboðsárskvota.

Norðhavssild:
51.231 tons, harav 5.280 tons sum sølukvota og 45.951 tons sum uppboðsárskvota.

Svartkjaftur:
33.196 tons, harav 33.196 tons sum sølukvota og onki sum uppboðsárskvota.

Botnfiskur í Barentshavinum og við Svalbard:
4.695 tons, harav 2.531 tons sum sølukvota og 2.164 sum uppboðsárskvota.

Svarið til hendan spurningin byggir á ta fyritreyt, at ongin uppboðssøla er hildin í 2020. Um uppboðssøla varð hildin í 2020, skuldu seldu rættindini í nøgdum, ið hava gildistíð meira enn eitt ár, roknast frá nevndu tonsatølum.

Viðmerking: Uppboðsárskvota verður seld fyri eitt ár og verður bert boðin út, um heildarkvotan er størri enn nøgdirnar ásettar í svari til spurning nr. 1, punkt 1 – 6 (sambært § 15, stk. 2 í lógini, sum var galdandi í 2018 og 2019).

Til nr. 3.
Umleið 570 mió. kr.

Uppboð

Fiskaslag	Tons	Kr./kg. meðal	Kr. í alt *(í 1.000)*
Makrelur	43.406	5,82	252.623
Norðhavssild	51.231	2,35	120.393
Svartkjaftur	33.196	0,47	15.602
Toskur Barentshavið og Svalbard	4.695	4,21	19.766
Uppboð í alt, umleið	**132.528**		**408.384**

Veiðigjøld

Fiskaslag	Tons	Kr./kg. meðal	Kr. í alt *(í 1.000)*
Makrelur	65.489	1,00	252.623
Norðhavssild	75.819	0,75	120.393
Svartkjaftur	200.262	0,20	15.602
Toskur Barentshavið og Svalbard	24.469	0,00	19.766
Veiðigjøld í alt, umleið	**366.039**		**162.406**

Uppboð og veiðigjøld, umleið			**570.789**

Prísirnir á uppboðssøluni eru ásettir samsvarandi meðalprísum fyri sølurnar í 2018 og 2019. Veiðigjøldini eru ásett samsvarandi lógini í 2019.

Í sambandi við svarið til hendan spurningin loyvi eg mær at viðmerkja, at umstøðurnar at veiða og selja fisk broytast almikið frá ári til ár. Til dømis kann nevnast, at avreiðingarprísurin fyri makrel hjá nøkrum skipum higartil í 2021 hevur verið runt roknað 5,50 kr. fyri kilo ella kanska heldur minni, sambært almennum yvirliti.

Til nr. 4.
Inntøkumetingin fyri 2021 er 314 mió. kr. Munurin er harvið smáar 260 mió. kr.

Um hækkingin í makrelkvotu í 2021 verður innroknað í inntøkumetingina av veiðigjøldum fyri 2021, er munurin smáar 200 mió. kr.

Til nr. 5.
8,5% av samlaðu føroysku kvotuni av ávísa fiskaslagnum.

Í tonsum verður nøgdin hendan.

Fiskaslag	Tons
Makrelur	14.199
Norðhavssild	12.202
Svartkjaftur	28.063

Viðmerking: Nevndu tonsatøl mega ikki tulkast sum nøgdir, ið kundu verið lýstar sum leysar at søkja, tí møguligar áður játtaðar kvotur, ið hava gildi í 2021, skulu dragast frá nevndu tonsatølum.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður